# Tummas: Mær dámar væl at syngja í kóri

**Í annaðkvøld verður árliga Lucia-konsertin, har m.a. barnakórið "Dropar" fer at syngja. Í kórinum eru fleiri dreingir, teirra millum Tummas Sigvardsen**

LUCIA
*Snorri Brend*



**Havn:** - At syngja?! Tað er bara fínt at syngja!

Ein av ungu sangarunum, sum fer á pallin í Norðurlandahúsinum í annaðkvøld er 13 ára gamli Tummas Sigvardsen úr Havn.

Hann hevur í eini tvey ár sungið við í barnakórinum "Dropar" undir leiðslu av Sigrið Sivertsen. Og nú skal hann enn einaferð á pall.

Jú, tað dámar mær væl. Vit syngja so nógvar fínar sangir, sigur hann við Sosialin.

Barnakórið Dropar er eitt av fleiri innsløgum við árligu Lucia-konsertina, har nógvur sangur og tónleikur er á skránni, - og sjálvandi eisini Lucia-gongd.

**Drongur í kóri**

Týsdagin í farnu viku møtti Tummas spentur upp, saman við hinum ungu til enn eina venjing.

Á skránni fyri hesa venjingina var konsertin í annaðkvøld. Seinastu tveir mánaðirnar hevur Fimmboði Lisberg vant kórið, meðan Sigrið Sivertsen var upptikin við tí sangliga partinum av Ronju Ránsmannadóttur.

Við konsertina í morgin fer Sigrið at leiða kórið, meðan Fimmboði tekur sær av tí tónlistarligu leiðsluni.

Saman við øllum hinum møttu tey henda seinnapartin, og fóru beinanvegin í gongd við eitt av løgunum, sum tey skulu framføra í annaðkvøld.

Tummasi dámar væl at syngja, og fyri hann er líkamikið, hvat onnur – ella rættari sagt: aðrir dreingir – halda um tað.

Eg veit, at tað er ikki vanligt hjá dreingjum at syngja í kóri. Onkur heldur tað kanska vera snedigt, men mær dámar tað væl í øllum førum.

Tað er tí, at eg framvegis eri við, sigur hann. Hann er tó langt frá einsamallur drongur í hesum barnakórinum.

Hann byrjaði at syngja, tí beiggi hansara sang við í kóri.

Eg var eitt sindur øvundsjúkur inn á hann, og tí fór eg uppí kórið, sigur Tummas.

## Lucia-konsertin

**Á skránni fyri Lucia-konsertina í annaðkvøld er hetta á skránni:**
**Tórshavnar Ungdómshornorkestur**
**Ein bólkur við tvørfloytum**
**Solo- og duett: Erla Bech Jensen og Jóannes Lamhauge**
**Barnakórið Dropar**
**Ung Stjørnuskot**
**Luciagongd**
**Felagskór saman við øllum tónleikarunum**


# JÓLAAFTAN Í KFUK



Vit eru nøkur, sum halda jólaaftan í KFUK. Eingin orsøk er til at sita einsamallur jólaaftan, so øll eru hjartaliga vælkomin at vera við, og hetta tiltak er ókeypis.

**Jólahaldið byrjar klokkan 19.00**

Áhuga kunnu tekna seg og fáa nærri at vita hjá Sonju Klein, presti, tlf. 310 177 og Louisu í KFUK tlf. 311 928.

**TILMELDINGARFREIST HÓSDAGIN 22. DESEMBER Á MIDDEGI**

FÆST UM ALT LANDIÐ




Ein hent jólagáva

SKIPALISTIN **hevur lógarkravdan** føroyskan álmanakka